gult16 cyan16 magenta16 svart16



# Sunnudagur 13. mai

**svf**

12.45 Formel-1 koyring í Eysturríki
15.15 Villar delfinir – náttúrusending
16.00 Ársfundur hjá heimamissiónini í Nesvík Regin Høgnesen
17.10 Tito – ein einsamallur maður 2:2 – ein BBC-sending
18.00 Fínt skal tað vera
18.30 Pinkupól 10
18.35 Jumanji 15
19.00 Gandahúsið 2:6 25
19.25 Prinsurin og biddaradrongurin 2:65
19.50 Andakt við Símun í Túni
20.00 Basalt
20.30 Serial Mom – am. filmur
22.00 Bókatátturin – samrøða við Rose Tremain
22.30 Reimer Bo hittir Ole Borneman
23.10 Lars Lilholt Band
23.45 Formel-1 koyring í Eysturríki – samandráttur
00.15 Liðugt

**EURO SPORT**

07:30 Superbike
08:00 Superbike
08:30 Superbike (Live)
09:00 Supersport (Live)
09:30 Formula 3000
10:45 Superbike (Live)
12:00 Supersport (Live)
13:00 Motocross
14:00 Super Racing Weekend(Tm)
14:30 Super Racing Weekend(Tm)
17:00 Cycling
18:00 News
18:15 Tennis
19:15 Superbike
20:15 News
20:30 Nascar
22:00 News
22:15 All Sports
22:45 Super Racing Weekend(Tm)
00:00 News
00:15 News
00:30 Close

**BBC PRIME**

0.00 DJ
0.55 TLZ: »Science Bites«
1.00 TLZ: »Renaissance Secrets: Secret of the Winte«
1.30 TLZ: »The Crunch - Under Examination«
2.00 TLZ: »The True Geometry of Nature«
2.25 TLZ: »Science Bites – Natural Symmetry«
2.30 TLZ: »South Korea – The Struggle For Democracy«
3.00 TLZ: »Roof of the World«
3.30 TLZ: »The Poverty Complex«
4.00 TLZ: »A New Way of Life«
4.30 TLZ: »Psychology in Action: Understanding Viol«
5.00 TLZ: »Global Firms Shrinking Worlds«
5.30 TLZ: »Global Warming: Global Policy?«
6.00 Dear Mr Barker
6.15 Dear Mr Barker
6.30 William's Wish Wellingtons
6.35 Playdays
6.55 Vip
7.20 Smart Hart
7.35 Smart Hart
7.50 Playdays
8.10 Insides Out
8.35 The Really Wild Show
9.00 Top of the Pops
9.30 Top of the Pops 2
10.00 Totp Eurochart
10.30 Doctor Who: »Mawdryn Undead«
11.00 Ready Steady Cook
11.45 Ready Steady Cook
12.30 Style Challenge: »Frank and Nicholas
13.00 Doctors: »God's Gift«
13.30 Eastenders
14.00 Eastenders
14.30 Eastenders
15.00 Dear Mr Barker
15.15 Playdays
15.35 Vip
16.00 Chronicles of Narnia: »Lion, Witch, Wardrobe«
16.30 Chronicles of Narnia: »Lion, Witch, Wardrobe«
17.00 The Antiques Show
17.30 Antiques Roadshow: »Forde Abbey«
18.00 Gardeners' World
18.30 Casualty
19.30 Parkinson: »The Bee Gees«
20.30 The Passion
22.00 The Human Body
23.00 Between the Lines: »Foxtrot Oscar«

**BBC WORLD**

00.00 BBC News
00.30 This Week (r)
01.00 BBC News
01.30 Holiday (r)
02.00 BBC News
02.30 Science World (r)
03.00 BBC News
03.30 Timothy McVeigh: Plan and Execution (r)
04.00 BBC News
04.30 This Week (r)
05.00 BBC News
05.30 Top Gear (r)
06.00 BBC News
06.30 Reporters
07.00 BBC News
07.30 Physical World (r)
08.00 BBC News
08.30 Earth Report (r)
09.00 BBC News
09.30 This Week (r)
10.00 BBC News
10.10 The Extinction Files (r)
11.00 BBC News
11.30 Click Online (r)
12.00 BBC News
12.30 Science World (r)
13.00 BBC News
13.10 Violent Planet (r)
14.00 BBC News
14.30 Top Gear (r)
15.00 BBC News
15.10 Dateline London
16.00 BBC News
16.10 Pole To Pole (r)
17.00 BBC News
17.30 Holiday (r)
18.00 BBC News
18.10 The Extinction Files (r)
19.00 BBC News
19.30 Science World (r)
20.00 BBC News
20.10 Violent Planet (r)
21.00 BBC News
21.30 Top Gear (r)
22.00 BBC News
22.30 Dateline London (r)
23.00 BBC News
23.30 Reporters
23.45 Asia Today

**3**

06:00 Børne-hjørnet med Disney
09:35 Barnemad
10:05 Skat - børnene er skrumpet(G)
11:00 Dummere end politiet tillader
11:25 Xena - amazonekrigeren
12:20 Herkules den uovervindelige
13:15 Fanget i Amazonas(G)
14:15 Heksene fra Warren Manor(G)
15:10 Dawsons Creek - classic
16:05 Popular
17:00 En chance til
18:00 Onside: Faxe Kondi Ligaen
19:00 Tve-Kampen
20:00 Søndagsfilmen: Sjakalen
22:25 TV Razzia
22:55 Gangster-ligaen
23:55 Herkules – en ring af ild
01:35 Walker, Texas Ranger
02:30 Sunset Beach(G)
03:20 Sunset Beach (G)
04:10 Godnat

**ÚF**

10.00 Tíðindi
10.05 Sunnudagsløtan - Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein stíla fyri
10.30 Sálmar og sangir (e) - 50 ár síðani Hans Andrias Djurhuus doyði. Steingrím Niclasen leggur til rættis.
11.00 Guðstænasta í Vesturkirkjuni - Heri Joensen, prestur, prædikar
12.10 Úr konserthøllini - Edvard Nyholm Debes skipar fyri
12.45 Døgurðatónar
13.10 Á ferð um víddir - 2. partur av ferðafrásøgn eftir Niels Juel Nolsøe. Robert MCBirnie lesur.
13.40 Nýtt í stíli og orðalag - Føroyskir sangir. Janus Mohr leggur til rættis
14.00 Tíðindi
14.15 Kvøðuljómar
15.45 Frásøgn frá fótbólti - Sagt verður frá fyrru hálvfinalunum í kappingini um løgmanssteypið.
17.00 Tónar og greinir (e) - Birgar Johannesen leggur til rættis.
18.00 Tónleikur
18.30 Tíðindini
18.40 Ítróttartíðindi
19.00 Krás - Barna- og familjusending. Hanna Vágsheyg og Ragnhild Ellingsgaard leggja til rættis.
20.00 Popp -Topp listin - Gunnar Nolsøe leggur til rættis
21.00 Ítróttatímin - Kristian Joensen stílar fyri
21.45 Aktuelli gesturin
22.00 Sputnik - Fróði Løkságarð og Kári Sólstein leggja til rættis
23.00 Veðurtíðindi

**Rás 2**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Gospeltónleikur
13.00 Kelduvaðið - Sending úr bandasavninum hjá EVR-Studio - Zacharias Zachariassen talar um evnið »Einglar«
14.10 Føroyskir sangir og sálmar
15.00 Lættur tónleikur
16.00 Barnarásin
16.30 Tónleikur
21.15 Orðið (e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur

**Lindin**

9.00 Byrjan – Dagsskrá
9.05 Lovsangur
9.30 Barnalindin
10.00 Okkara dagliga breyð
10.30 »Blóðvitni úr katekombunum« ókendur høvundur. Páll Poulsen hevur umsett, Símun Absalonsen lesur
11.00 Framhaldssøgan »Føddur av nýggjum« av Charles Colson. Jóan Petur Jacobsen hevur umsett, Jónfinn Petersen lesur. (e)
12.00 Møti úr Karisma møtirøðini í Runavík. Talari Teresia Warimu
13.00 Dagsskrá verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð (e)
13.45 Lívgandi Orð
13.30 Lovsangur
14.30 Barnalindin (e)
15.00 Sjómanssendingin Vitin v/ M. C. Restorff (e)
16.00 Tónleikur
17.55 Dagsins orð, eftir Svenning av Lofti
18.00 »Tónleikur fyri tilkomin« við Steindór og Tórbjørn (e)
19.00 Tónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
21.00 Møti úr Karisma møtirøðini í Runavík. Talari Teresia Warimu
22.55 Dagslok - Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Vit gevast

## Basalt




Láturdagur, plantualing og erotiskur dansur eru tey 3 evnini sum Basalt hevur á skránni komandi sunnukvøld.

Okkara tilvera er so strongd og ferðmikil at vit heilt gloyma at flenna. Børn flenna eini 200 ferðir um dagin, meðan vaksin bara flenna umleið 15 ferðir. Men 6 mai royndu nøkur fólk at bøta um hetta, tí tá var Altjóða Láturdagur hildin fyri fyrstu ferðí Føroyum. Kring allan heim vóru fólk savnaði at halda henda dagin, á Ráðshúsplássinum í Keypmannahavn vóru 6.000 savnaði bara fyri at flenna saman. Skarin í Grasagarði í Havn var eitt sindur minni, har okkara fyrsti láturinstruktør Vivian Guðmundsson skipaði fyri, men fólk tóku væl undir við tiltakinum at flenna saman, sum er gott bæði fyri kropp og sál.

Á próvnum hjá Rakul Arnfríð Dam stendur at hon er útlærdur gartnari í plantualing. Rakul hevur í skjótt 9 ár arbeitt hjá Skógrøkt landsins, har hon er við til at ala trø, sum er serliga vælegnaði til føroyska veðurlagið. Á Skógrøktini framleiða tey 200 ymisk sløg av trøum, og eftirspuringurin eftir hesum trøum er stórur. Í sendingini greiður Rakul frá sínum arbeiði sum plantualari og eisini fer hon at vísa okkum, hvussu vit skulu planta og handfara eitt træ fyri at fáa tað besta úrslitið.

"Tá man sær gott út og elskar at dansa so er lætt eisini at byrja at strippa" hetta sigur tann professionelli striptease-dansarin Brina, sum var í Føroyum herfyri og eggjaði føroyingar við erotiskum dansi í einum klubba í Havn. At strippa er eitt arbeiði eins og annað arbeiði og genturnar vinna væl av peningi, tá tær fara út á ymisk støð at dansa og blaka pløggini av sær.

## Sjakalurin

*– Amerikanskur action-spenningsfilmur frá 1997*




Bruce Willis hevur høvuðsleiklutin sum tann kendi yvirgangsmaðurin, Sjakalurin. Hann fær ta uppgávu at taka lívið av einum persóni í amerikansku stjørnini, men ikki er greitt, hvør hesin er.

Avtalan er, at Sjakalurin fær 70 milliónir dollarar fyri hesa uppgávuna. Helmingin áðrenn og hin helmingin aftaná. Sjakalurin kundi tikið helmingin og sloppið sær burtur, men honum dámar væl at jagstra sítt offur og drepa tað.

gult17 cyan17 magenta17 svart17

# Vikuskifti

Nr. 90 • leygardagur • 12. mai 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo



## Eric Clapton - »a reptile«

10.000 áhoyrarar í Forum lurtaðu eftir Eric Clapton og hansara tónleikaligu elitu.

Lesið á síðu 3



Reidar Nónfjall:

## Millum brot og vandasker

Kontanti hvalbingurin stendur á brúnni hjá Strandafaraskipum Landsins, og hóast stovnurin er eitt yndisoffur hjá misnøgdum fólki, trívist Reidar Nónfjall væl í útsetta starvinum

Lesið á síðu 4-5



## Unga Listin

Ung List er heitið á framsýning, sum seinastu dagarnar hevur verið at sæð í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru ung listarfólk, ið standa aftan fyri framsýningina, og tey leggja dent á, at hetta eru listarverk, sum eiga at vera skoðað realistiskt

Lesið á síðu 6-7



## Nýggjan pall í Roskilde

Fyri at bøta um tryggleikan og sleppa undan enn einari syndarligari vanlukku, verður appelsinguli Canopy pallurin víðkaður, so hann verður triðjingin størri

Lesið á síðu 2

# Mold undir neglirnar

**Leygardagin var fyrsti flokkur í Tvøroyrar Skúla og setti epli niður. Hetta er bæði eitt sosialt tiltak saman við foreldrum og systkum og ein partur í undirvísingini**



*Hetta er fyrsti flokkur á Tvøroyri úti á Støklunum í Froðba, har tey settu epli niður leygardagin. Aftasta rað frá vinstru eru tey: Beinta Ludvig, Bára Holm, Elin Kristina Hammer, Guðrið Ludvig, Súsanna Mortensen, Kristina Olafsdóttir, Rókur Poulsen, Eirikur Mørkøre, Páll Heri Nolsøe og Sámal Eystaná.*
*Í miðraðnum eru tey f. v: Gunvør Joensen, Benjamin Sikivat, Arvid Olsen, Benjamin Nielsen, Kjartan Johansen og Alexander Højgaard.*
*Í fremsta rað sita frá vinstru: Ragnar Joensen, Arthur Poulsen, Rógvi Joensen og Hanus Tummasarson Tvey børn i flokkinum, Sára Farstad og Sirið Jóanesardóttir eru ikki við á myndini, ti tey vóru burtustødd hendan dagin*

ØÐRVÍSI UNDIRVÍSING

*Áki Bertholdsen*

At ganga í skúla nú á døgum er ikki, hvat tað hevur verið. Fyrr sótu næmingarnir mest á teirra fløtu og terpaðu tabell, sálmavers og kongarekkjuna. Men nú á døgum er alt meiri og meiri vanligt at lata undirvísing og handaligt arbeiði smelta saman til eina eind.

Eisini á Tvøroyri gera ikki sørt burturúr at royna øðrvísi leiðir í undirvísingini.

Tað seinasta tiltakið í so máta er ein ætlan, sum lærarin, Otto Leo Gram, hevur lagt til rættis saman við fyrsta A og foreldrum teirra, har tey í ár skulu arbeiða eftir árstíðini.

Og nú er vár og hetta er tann tíðin, tá ið fræðini í jørðina verða sáað.

Tískil pakkaðu tey posa og sekk í góðveðrinum leygardagin og fóru út undir Støklarnar í Froðba at seta epli niður á einum stykki, sum tey hava fingið til endamálið.

–Hetta er ikki eitt fak, sum stendur á tímatalvuni. Men hetta er eitt flokstiltak, sum er líka nógv eitt sosialt tiltak sum tað er eitt undirvísingartiltak, sigur Otto Leo Gram.

Sostatt fór allur fyrsti flokkur, saman við systkjum, foreldrum og øðrum skyldfólki, til verka leygardagin við haka og spaða og seteplum.

–Fyrst var at loysa flagið og tað máttu páparnir gera, tí tað er tungt. Aftaná hjálptu mammurnar til at seta niður og so var flagið lagt omaná aftur.

– Og eftir lokið verk høvdu foreldrini rigga til við drekkamunni úti í bønum, so at øll fingu eina kakubita og eina hugnaliga løtu aftaná.

Í heyst fara børnini so sjálvsagt aftur út til Froðbiar at taka eplini upp. Men ein eplavelta skal røkjast so í summar fara tey eisini at gera nakrar túrar út til veltuna at vita, hvussu vorðið er, og trongir okkurt til at verða trivið í, verður tað gjørt.

Otto Leo Gram sigur, at fyri at fáa veltingina setta inn í ein samanhang, hava tey longu fingið tilsøgn um eitt ella tvey lomb, sum tey fara at fletta í heyst.

– Kjøtið skal so hongjast upp og so ætlanin er at hava eitt kvøld, har vit fáa ræst kjøt og epli frá okkum sjálvum at eta.

Í ullarroyting er eisini ætlanin at fáa fatur á ull. Og kemur grind ætla tey ikki at liggja sjóvarfallið av sær. Lærarin fær helst ikki havt tey við í grind, men hann hann kann hava tey við at býta og at skera upp.

### Fáa nakað burturúr

Otto Gram ivast ikki í, at hetta er eitt slag av skúlaskapi, sum kastar nógv av sær á meiri enn ein hátt.

– At seta epli niður er ikki ein lærugrein í sær sjálvum. Men tað ber væl til at samansjóða hetta tiltakið við lærugreinina "heimstaðarlæru". Tað ber til at hava ein eplaslokk úr veltuni við í skúla og greiða børnunum frá, hvat tað er, sum fer blómur og urtir at grógva og, hvussu tað ber til, at tey kanska fara at fáa 8-10 fold uppaftur av tí, tey settu niður. Í heyst ber tað eisini til at samansjóða flettingina við undirvísingina í lívfrøði.

Men hann heldur eisini, at tiltøk sum hesi, hava stóran týdning í at styrkja samanhaldið í flokkinum og samstarvið ímillum foreldrini og skúlan. Foreldrini hava eisini stórt gagn av at hittast til óformliga samveru av og á.

–Hetta er eitt tiltak, sum foreldrini hava tikið lut í við fullum huga. Tey taka yvirhøvur sera væl undir við tí, sum skúlin skipar fyri og er okkurt á skránni, eru tey altíð til reiðar, sigur Otto, Leo Gram.

Og fyri alt tað, so duga børnini nú at seta epli niður og tað er væl heldur ikki so galið. Summi høvdu roynt tað áður, men verri enn so øll, sigur Otto Leo Gram.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at tey skipa fyri onkrum serligum. Fyrsti flokkur á Tvøroyri hevur samstarv við fyrsta B, sum gongur í hin skúlan í Kommununi, skúlan í Trongisvági.

– Ein dagin í vetur vóru vit øll úti og skreiddu og tuskaðust í kavanum. Og í summar er eisini ætlanin at fara í viðarlundina onkran dagin at grilla og at spæla í ánni.

### Bjóða Høgna Hoydal

Nú, vit tosa um alt hetta her, kemur Otto Leo Gram at minnast afturá, at tá ið læraraverkfallið var í fjør, kom hann einaferð í prát við Høgna Hoydal, sum tá var skúlamálaráðharri.

– Tá helt landsstýrismaðurin fyri, at skúlin var ikki nógv broyttur seinastu øldina, tí børnini sótu enn fyri tað mesta inni og terpaðu.

– Eg má viðganga, at eg bleiv eitt sindur argur, tí á nógvum skúlum er tað so langt frá veruleikanum, sum tað kann vera. Tá bjóðaði eg honum oman í Kommunuskúlan, har eg tá var lærari, at síggja, alt vit høvdu gjørt av ymsum. Hann tók ikki av....

Men Otto gram sigur, at nú ætlar hann sær at gera eina roynd afturat at vísa landsstýrismanninum, at skúlin er ikki so stirvin, sum hann hevur verið.

So kanska verður Høgni Hoydal boðin í ræstkjøtveitslu á Tvøroyri í heyst......